# Frakland uttan Vieira



Patrick Vieira er ikki millum teir 24, sum franski landsliðsvenjarin hevur tikið út til play-off dystirnar móti Írlandi. Við sínum 33 árum og 107 landsdystum verður Vieira annars roknaður millum stuðulsspælararnir hjá Fraklandi. Og seinastu nógvu dystirnar hevur hann eisini borið liðskiparabindið, tá hann hevur verið við. Í Inter hevur hann tó havt trupult við at finna vanliga stórformin, og tað hevur kostað, nú Raymond Domenech skuldi gera av, hvørjar hann vildi hava við sær til teir báðar altavgerandi dystirnar móti Írlandi. Samlaði vinnarin av teimum báðum uppgerðunum sleppur við til HM-endaspælið í Suðurafrika, so talan er um óhugnaliga týðandi uppgerðir hjá fronsku varaheimsmeistarunum. Tann 14. november spæla liðini í Írlandi og fýra dagar seinni eru returuppgerð í Fraklandi.

# Schmeichel var størstur

Árini, sum danski Peter Schmeichel spældi í Manchester United, varð fleiri ferðir sagt, at hann var heimsins málverji. Og stendur tað til Sir Alex Ferguson, so er eingin ivi. – Í míni tíð sum venjari er Peter Schmeichel tann besti málverjin, sum vit hava sæð. Hann var heilt einfalt einastandandi góður, sigur Ferguson við danska TV2. Schmechel var við til at finna fimm meistaraheiti við Manchester United, umframt at hann í seinasta dysti sínum fyri felagi var við til at vinna Champions League-steypið eftir eina ótrúliga finalu móti Bayern München.



Neistin er fremst og KÍF aftast. Men seinastu úrslitini hjá kollfirðingum prógva tó, at teir væl og virðiliga kunnu bíta frá sær

# Europa skundar undir

**Menninir hjá Neistanum skulu í miðvikuni spæla Europa-Cup, og tí spæla teir longu sunnudagin móti KÍF**




Jákup Mørk

Á pappírinum tykjast kollfirðingar at vera mest yvirkomuliga mótstøðuliðið av øllum í Atlantic Airways-deildini, og við oddastøðuni hjá Neistanum í mentu, eru havnarmenninir greiðir favorittar.

Men seinastu tveir dystirnar hevur KÍF tó bitið væl og virðiliga frá sær, og tí eru teir hjá Neistanum ávaraðir um, at talan als ikki verður um nakran walkover fyri teirra viðkomandi.

Hjá kvinnunum er talan somuleiðis bert um tann eina dystin, sum stendur á kappingarskránni. Hesin verður í Klaksvík, har Stjørnan tekur ímóti VB. Seinnu árini hevur talan verið um nógvar knallharðar dystir millum júst hesi mótstøðuliðini, men í ár er VB byrjað mest sum av nýggjum, og tí bendir alt á ein tryggan heimasigur í uppgerðini.

# TB hevur tveir kjansir

**Flogbóltskvinnurnar hjá TB skulu spæla tveir dystir norðanfjørðs um vikuskiftið, og hetta er teirra møguleiki at fáa fyrstu stigini og nærkast hinum liðunum, ið renna aftan á SÍ. Hjá monnunum kann Mjølnir styrkja sær oddastøðuna**




Hilmar Jan Hansen

Fleiri ábendingar eru um, at TB-kvinnurnar, sum rótaðu í botninum síðsta vetur, fara at fáa munandi meira burturúr hetta kappingarárið. Fyrst tóku tær eitt sett frá Fleyr og síðani tvey frá Mjølnir, og um vikuskiftið skulu tær møta tveimum av liðunum, ið heldur ikki hava tað nógva at vísa á á stigatalvuni.

Í morgin skal TB spæla ímóti KÍF í ítróttarhøllini í Kollafirði og sunnudagin ímóti ÍF á Kambsdali. Fær TB fult burtur úr hesum báðum dystunum, er talan brádliga um eitt pláss í miðjuni. Undan hesum báðum dystunum hevur ÍF tvey stig, meðan bæði KÍF og TB eiga fyrstu stigini til góðar.

Av teimum sjey liðunum í Eikliguni hjá kvinnum, hava bæði SÍ og Fleyr frí um vikuskiftið, og tað kann annaðhvørt Mjølnir ella Dráttur gera sær dælt av, tá tey møtast í Badmintonhøllini í Klaksvík sunnudagin. Vinnarin kemur upp á seks stig og er tá bara tvey stig aftan fyri SÍ.

Upprunaliga skuldi Fleyr spælt ímóti KÍF sunnudagin, men tann dysturin er útsettur til fríggjakvøldið 20. november.

## Mjølnir fer avstað

Hóast tað ikki var gamalt at selja skinnið, fyrr enn bjørnin var skotin, so skal tað vera øgiliga løgið, um ikki Mjølnir er minst líka væl á odda í Eikliguni hjá monnum eftir vikuskiftið, sum liðið er tað áðrenn. Mótstøðuliðið í Badmintonhøllini í Klaksvík sunnudagin er ÍF, sum vann greipuna síðsta vetur, men enn ikki hevur verið í nánd av einum stigi hetta kappingarárið.

Mjølnir er frammanundan tvey stig framman fyri SÍ og fýra stig framman fyri Fleyr, so oddastøðan verður neyvan hótt. Júst hesi bæði, sum jagstra klaksvíkingarnar, hittast í Gundadalshøllini í morgin, og helst kunnu áskoðararnir vænta sær ein javnan og spennandi dyst. Í øllum førum, um liðini liva upp til fyrru uppgerðina sínamillum, ið gjørdist ein spennandi fimmsettari við SÍ sum vinnara til síðst.

# Dystir um vikuskiftið

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 08.11 | 15.00 | Stjørnan-VB |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 08.11 | 16.00 | KÍF-Neistin |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 07.11 | 16.00 | KÍF-TB |
| 08.11 | 14.00 | ÍF-TB |
| 08.11 | 14.00 | Mjølnir-Dráttur |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 07.11 | 16.00 | Fleyr-SÍ |
| 08.11 | 16.00 | Mjølnir-ÍF |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Tjaldur | 5 | 5 - 0 - 0 | 165 | 116 | 49 | 10 |
| 2 Stjørnan | 5 | 4 - 0 - 1 | 147 | 105 | 42 | 8 |
| 3 Neistin | 5 | 4 - 0 - 1 | 136 | 112 | 24 | 8 |
| 4 VÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 110 | 148 | -38 | 2 |
| 5 VB | 4 | 0 - 0 - 4 | 78 | 110 | -32 | 0 |
| 6 StÍF | 4 | 0 - 0 - 4 | 81 | 126 | -45 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 6 | 5 - 0 - 1 | 194 | 163 | 31 | 10 |
| 2 StÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 171 | 162 | 9 | 8 |
| 3 H71 | 6 | 3 - 0 - 3 | 151 | 150 | 1 | 6 |
| 4 Kyndil | 6 | 3 - 0 - 3 | 158 | 165 | -7 | 6 |
| 5 VÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 171 | 167 | 4 | 4 |
| 6 KÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 138 | 176 | -38 | 2 |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 4 | 4 - 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 Dráttur | 4 | 2 - 2 | 8 | 6 | 2 | 4 |
| 3 Mjølnir | 3 | 2 - 1 | 6 | 5 | 1 | 4 |
| 4 Fleyr | 3 | 2 - 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 5 ÍF | 4 | 1 - 3 | 3 | 9 | -6 | 2 |
| 6 TB | 2 | 0 - 2 | 3 | 6 | -3 | 0 |
| 7 KÍF | 2 | 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 - 0 | 12 | 5 | 7 | 8 |
| 2 SÍ | 4 | 3 - 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 Fleyr | 4 | 1 - 3 | 8 | 9 | -1 | 2 |
| 4 ÍF | 4 | 0 - 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |